


*Tað tóktist kosta dýrt hjá unglingunum, at teir í alt ov lítlan mun hava royndir úr bestu deildini*

# Kvinnurnar rukku ikki bronsuni

**Føroysku U-19 landsliðini í flogbólti hava hesa seinastu vikuna roynt seg í altjóða kapping í Noreg**

FLOGBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Serliga hjá kvinnunum gekst væl, men tað var tó eitt stórt vónbrot, at tær ikki megnaðu at vinna bronsuna, sum annars tóktist liggja beint fyri.

Høvdu Føroyar í seinasta dystinum bara vunnið eitt sett móti norsku mótstøðuni, var bronsan vís. Hetta tí føroyska liðið hevði vunnið tryggan sigur á einum enskum liði.

Tað varð eisini roknað við, at føroysku kvinnurnar skuldu vinna hendan dystin, men her vildi einki bera til. Serliga gekst illa í hond tey bæði fyrstu settini, men í triðja settinum kom føroyska liðið tó fyri seg. Nóg mikið var tað tó ikki, og norska liðið vann tí 25-23 í hesum seinasta settinum, sum altso avgjørdi bronsuna.

Tað var sjávlandi eitt stórt vónbrot, men hinvegin taldi tað avgjørt rætta vegin, at Føroyar vunnu seg av niðasta plássinum. Og fyri framtíðina er tað helst eitt gott tekin, at ikki færri enn sjey av føroysku spælarunum eisini kunnu spæla í U-19 næstu trý árini.

### Ov lítil spælitíð

Hjá dreingjunum gekst ikki heilt so væl. Allir dystirnir í kappingini vórðu taptir við 3-0, og serliga tóktist tað vera kropsliga støddin og styrkin, sum kostaði dýrt hjá okkara.

Boðini úr føroysku leguni vóru eisini hampuliga greið í so máta. Tað kostar, tá spælararnir at kalla ikki fáa spælitíð í bestu deildini, og tí verða teir afturúr sigldir sammett við útlendsku javnaldrararnar, verður sagt.

# KÍ pinkur føroyameistarar

Tað eru ikki bara tær vaksnu kvinnurnar, sum duga at spæla fótbólt í Klaksvík. Eisini tær yngstu genturnar roynast væl, og um vikuskiftið vann KÍ pinkudeildina, sum er fyri gentur upp til 10 ár.

Fýra tey bestu pinkuliðini spældu tvey finaluumfør – eitt í Vági og eitt á Argjum – og KÍ vann allar sínar seks dystir. Liðið fekk harvið fult stigatal og gjørdist tryggur føroyameistari. VB vann silvur, AB bronsu, og ÍF var nummar 4.

Hetta er triðja árið á rað, at KÍ vinnur pinkudeildina, so tað eru nógvir góðir gentuspælarar á veg upp gjøgnum deildirnar í KÍ.



*KÍ pinkur føroyameistarar 2005. Aftan frá vinstru: Ása Klein Olsen, Elinborg Olsen, Mina Sirdal, Maria K. Thomsen og Bára S. Klakstein, venjari. Framman frá vinstru: Ásla Johannesen, Eyðvør Klakstein, Lydia Marsten, Tina Joensen og Sigrun Sirdal*

# Meistarar úr Sandavági



*Hjá gentunum 12-14 ár B, var finaluumfarið spælt í Sandavági seinasta vikuskifti. Her eydnaðist heimaliðnum at vinna meistaraheitið. Liðið, sum er mannað við gentum úr Sandavági og Kvívík, var mannað soleiðis: Miriam Akselsen, Maria Svabo Samuelsen, Laila Kjarbak, Maja H.Heinesen, Lis Elin Weihe Nilsen, Linda Davidsen, Olivia Jensen, Sólgerð Joensen, Asta Müller og Oddvør Vang. Venjari var Silva da Braga*

# HB eigur bestu piltarnar

Í meistarabólkinum í piltadeildini eydnaðist A-liðnum hjá HB at vinna meistarheitið. Liðið mátti bert tvær ferðir í ár taka til takkar við javnleiki, og tí var munurin niður til næstu liðini eisini somikið tryggur, at gullið kom til høldar longu á næst seinasta leikdegi.

*HB-piltarnir, sum nú eru meistarar. Aftast f.v.: Áki Johansen (venjari), Oyvindur Lützen, Fríði Atlason, René Joensen, Ivan G. Hofgaard, Allan Hansen, Alexandur L. Black, Tróndur Jensen, Tróndur Jensson, Ingolvur Gunnarson (venjari). Fremst f.v.: Frank Askildsen, Jógvan á Steig, Høgni Klein Olsen, Regin Gregoriussen, Sverri M. Mortensen (liðsk.), Hallur Biskupstøð, Tóki á Lofti, Rógvi Reinert*

